gult cyan magenta svart

Boðskapurin hjá løgmanni: Stór ósemja í samgonguni



– Trongdin hjá løgmanni at endurtaka seg sjálvan kann ikki merkja annað enn, at hann onki nýtt hevur at føra fram, sigur Edmund Joensen

– Summi av teimum málum, sum samgongan hevur sett sær fyri, lata seg ikki gera, sum støðan er nú

ÁKI BERTHOLDSEN

– Tað er stór ósemja í samgonguni um tann politikk, sum skal førast í framtíðini.

Tað er niðurstøðan hjá Edmundi Joensen, nú hann hevur hoyrt ólavsøkurøðuna hjá løgmanni.

Formaður sambandsfloksins sigur, at tað var so lítið nýtt í løgmansrøðuni, og hon var so lítið ítøkiligt, at tað kann ikki boða frá øðrum enn djúptøknum ósemjum í samgonguni um tann førda politikkin.

–Løgmansrøðan er full av endurtøkum frá undanfarnu árum. Hendan trongdin at endurtaka seg sjálvan, kann ikki vera annað enn eitt tekin um, at onki nýtt er at føra fram.

– Somuleiðis boðaði løgmaður frá eini ørgrynnu av aðalorðaskiftum, sum skulu vera í tinginum um alskyns mál.

–Tí kann ólavsøkurøðan ikki tulkast øðrvísi enn, at ósemjan er stór um, hvør politikkur.

Edmund Joensen sigur at vit vita eisini, at summi av teimum málum, sum løgmaður boðaði frá, lata seg ikki gera í samgonguni, sum er.

–Eitt nú boðaði hann frá, at almennir stovnar skulu privatiserast. Men tað vita vit ber ikki til, so leingi, sum hasir tríggir flokkarnir eru í samgonguni.

Edmund Joensen vísir eisini á, at løgmaður helt, at gongdin hevur verið nøktandi, uttan í fullveldissamráðingunum.

– Men tað er júst fullveldið, sum er høvuðsmálið hjá hesi samgonguni, og sum heldur henni sama. So tá ið gongdin ikki hevur verið nøktandi á tí økinum, er lítil meining í at vera nøgdur.

– Tey málini, sum løgmaður er nøgdur av at hava loyst, eru mál, sum hann hevur arvað frá undanfarnu samgongu, og sum lógu klár at loysa, sigur Edmund Joensen.

– At tað gongur væl búskaparliga er ikki takka verið hesari samgonguni.

– Orsøkin til tað kemur uttanífrá, við lágari rentu, høgum fiskaprísum og góðum fiskiskapi. Saman við loysnini á bankamálinum og skuldaravtaluni við danir, har danska stjørnin brúkti sítt kredittvirði til at útvega okkum bíliga rentu, eru orsøkin til gongdina.

– Annars er gongdin ikki betri enn so, enn at yvirskotið á handilsjavnanum er við at hvørva nú.

–Tað er eisini at manipulera við tølum at siga, at almenna umsitingin er minkað afturímóti búskapinum.

– Vøksturin í búskapinum hevur verið so stórur, at tað vildi verið undarligt, um almenna umsitingin ikki minkaði lutfalsliga. Men í turrum tølum er almenna umsitingin ógvuliga nógv vaksin.

Er afturvíst

Formaður sambandsfloksins vísir eisini tí aftur, sum løgmaður førir fram um, at danskir politikarar hava boðað frá, at blokkstuðulin fer at minka undir øllum umstøðum, um livistøðið í Føroyum fer uppum tað danska.

– Danskir politikarar hava longu víst hesum aftur.

– Tað er júst hetta, sum stríðið um skiftistíðina snýr seg um

– Og øll vita, at tað er ein himmalvíður munur á at vera í ríkinum og at vera uttanfyri, sigur Edmund Joensen.



Her er sangur og hugni á ólavsøku ár 2000. Næstu vikurnar verður tinghúsið karmur um m.a. røðuna hjá løgmanni á ólavsøku

Mynd: Jens K. Vang

gult cyan magenta svart

Ummæli av Ólavsøkukabarettini 2000:

Gó›

Tveir av trúbo›arunum i› hava vitja í Føroyum farna mána›in, Robinson-Morten og krossfararin Keith

Mynd: Jens K. Vang

N‡ útnevndi landst‡risma›urin Torbjørn Jacobsen í skinnundirbuksum heldur dundurtalu fyri fólkinum í Sjónleikarhúsinum. »Pengar og mentan hava einki vi› hvørt anna› at gera!« sigur holubúgvaraútgávan av landst‡rismanninum í undirvísingar- og mentamálum.

Mynd: Jens K. Vang

Eitt einfalt men kortini beinraki› ummæli av Ólavsøkukabarettini 2000, hev›i veri› ein grein, i› bert hev›i yvirskriftina »Gó›«, og annars ongan tekst. Men onkur hevur kanska hug at hoyra meir, og tey kunnu lesa ví›ari

RÚNAR REISTRUP

Hvussu var ólavsøkukabarettin?

– Hon var gó›.

Hvat liggur í hesum eina or›inum, sum vit hervi› hava heft upp á kabarettina.

Ta› kundi veri› at hon var gó› í mun til ólavsøkukabarettirnar farnu árini, men tygara ummælari hevur ikki havt møguleika at sæ› ólavsøkukabarettirnar tey farnu f‡ra árini, so setningurin »Í mun til hana í fjør, er hendan kabarettin gó›« fer ikki at koma fyri í ummælinum.

Í or›inum gó› liggur altso ikki nøkur mongdargrunda› gó›skumeting ei heldur eitt stiggevandi ummælaraparametur.

Upplivingin

Gó› fevnir um ta uppliving ásko›arin fær hendan hálvanannan tíman framman fyri ólavsøkupallin í Sjónleikarhúsinum í Havn, me›an teir fimm leikararnir og f‡ra tónleikararnir geva alt, teir kunnu. Tí hendan upplivingin er – gó›.

Ólavsøkukabarettin 2000 hevur nevniliga ta stóru styrki, at so at siga allir tær umlei› tredivu sketsjirnir eru stuttligir.

Langt er ímillum aldudalarnar, og hesir eru stuttir. Av tí sama hjálpir hvør sketsjur tí næsta á veg, tí ásko›arafjøldin skal sjáldan hitast upp aftur.

Fjøldin fær ongantí› tí› at kølna og tí ver›ur hatturin hervi› tikin av fyri.

Fimm pluss f‡ra

Sjónleikararnir í kabarettini eru bara fimm í tali. Men teir fylla nógv á pallinum. Undir pallinum sita f‡ra tónleikarar, sum eisini fylla nógv í ljó›myndini, men sum megna at dempa seg heilt ni›ur, tá sangur er á pallinum.

Kortini er ta› onkuntí› eitt sindur ringt at hoyra or›ini í sangunum, tí fyri ta› mesta ver›ur sungi› uttan mikrofon. Tey fimm á pallinum eru annars øll habilir sangarar, og høvdu tí megna› at sungi› ígjøgnum ljó›útger› og burdu kanska umhugsa› ta› til eina a›ru fer›.

Úrlatin offur

Ta› er lætt at gera eina kabarett stuttliga vi› at gera hana grova, men Ólavsøkukabarettin í ár heldur seg sjálva í skinninum og fer sjáldan serliga langt út um marki› fyri ta› sømiliga.

Kortini er hon ógvuliga undirhaldandi.

Navnnevndir persónar, almennir og »hálvalmennir«, fáa nokkso pena vi›fer›, men nakrir ávísir meiningir persónar, i› ikki beinlei›is eru navnnevndir, men kortini kendir, ver›a har›liga úrlatnir á pallinum í Sjónleikarhúsinum í hesum døgum.

Og hóast ta› mesta gongur sømiliga og væl fyri seg, so skal ta› vera sagt, at børn kortini eiga at fylgjast vi› foreldrunum, tá tey fara til kabarettina.

Tí so óskyldig er hon heldur ikki.

Teir aktuellu eru best

Ta› er ofta lætt at gita hvat ver›ur skemta› vi› á einari ólavsøkukabarett, tí hon er í sær sjálvum ein speisk vi›merking til ta›, sum hendir Í landinum.

Onkrir sketsjir eru púra óheftir at tí, sum fyriferst í Føroyum í løtuni, men teir stuttligastu og best eydna›u á Ólavsøkukabarettini 2000 eru rótfestir í tí, sum er hent ígjøgnum ári› og upptekur fólk her á landi.

Klaksvíksstrí›i› – ta› vi› skotbardøgum, løgreglu og so framvegis, er upplagt at skemta vi›, men nokkso ringt at fáa stuttligt. Kabarettin megnar tó uppgávuna í fyrstu atløgu, men so fara fingrarnir ov langt ni›ur í spannina, og ta› stuttliga fer av sketsjini, á›renn hon er li›ug

Tekur dystin upp vi› Lindina

Ta› sum er enn verri at skemta vi›, er bønartímin á bi›istø›ini Lindini. Hesir bønartímar eru so víttgangandi og ørir í sínum veruliga líki, at ein sketsj, har leikararnir sótu í Lindarstudionum og spældu bønarfólk aldri hev›i kunna› blivi› anna› enn ein minni› ví›gongd útgáva av einum bønartíma í Lindini, sum havnarfólk sita og flenna at dagliga.

Og hvat er so at gera – jú, man tekur ein veruligan bønartíma upp á band og spælir hann – bert eitt líti› sindur kuta›an – fyri ásko›arafjøldini, sum flennur sær tár í eyguni.

Hvat kabarettin annars kemur upp vi› at grumsi› frá botninum í føroysku samleikasálini skal ikki ver›a gjøgnugingi› her, men sparast til upplivingina í Sjónleikarhúsinum.

Tí hon er gó›.



Tríeinigheitin ø›ru megin frontlinjuna í serføroyska prestastrí›num, ver›ur illa stungin á Ólavsøkukabarettini 2000. Hvat hendir undir víttfevnandi prestakjólanum er ikki lukkuligt at siga hart.

Mynd: Jens K. Vang